

# Stjóri til Vøruhúsið

Føroya størsta vøruhús verður nú professionaliserað og skal hava nýggjan stjóra. Stjórin skal saman við leiðarum, lyklapersónum og nevndini gera og seta í verk framtíðar strategi- og virkisætlan fyri felagið. Tilvísing verður til nevndina.

Uppgávur stjórans verða av strategiskum, taktiskum og operativum slagi. Leiðsla, coaching og menning av leiðarum og lyklapersónum fer eisini at fylla nógv. Harumframt er tað týðandi, at tú hevur førleika at analysera og taka avgerðir við støði í fíggjarligu lyklatølunum.

Tú hevur eina merkantila útbúgving, gjarna við fíggjarligum yvirbygningi. Annar møguleiki er, at tú hevur fíggjarliga útbúgving, saman við hollum royndum við smásølu og heilsølu. Tú hevur viðkomandi leiðsluroyndir og dugur at samskifta við øll starvsfólkini. Tú hevur tev fyri keypmannskapi og megnar at umseta strategiskar avgerðir til lønsamar gerðir og úrslit.

Tú skalt vera motiverandi og duga at hugtaka, men eisini hava neyðugu persónligu slagkraftina. Tú er hugskotsríkur og hevur førleika at hugsa nýtt og øðrvísi í mun til handilsligu menningina.

Arbeiðið er sera spennandi og avbjóðandi. Tú fært víðar heimildir at seta tín dám á og menna virkið, eins og tú fært eina profesionella nevnd at samstarva við. Løn og setanartreytir verða eftir avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Hevur tú áhuga fyri starvinum, send so eina umsókn við prógvum til Vøruhúsið, Postrúm 1019, 110 Tórshavn. Viðmerk "Stjóri". Umsóknarfreistin er 15. september 2008. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Árna Arge, nevndarformann, tel. 215345 og teldupost arge@ikon.fo.

VØRUHÚSIÐ
www.voruhusid.fo

Vøruhúsið er Føroya størsta vøruhús, ið hevur sølustøð á Hjalla, í Klaksvík, í Runavík og á Tvøroyri. Umframt at reka smásølu, er Vøruhúsið eisini veitari til allar Litavalhandlarnar kring landið. Í samtakinum starvast í dag umleið 40 fólk. Vøruhúsið er ein familjufyritøka. Virksemið byrjaði í 1962 undir navninum Málingahandilin. Tað vóru brøðurnir Finnbjørn og Eyðun Mouritsen, ið byrjaðu virksemið í J. C. Svabosgøtu í Havn. Síðan byrjanina er samleikin og virksemið ment til Vøruhúsið. Vøruhúsið veitir í dag kundum sínum heildarloysnir. Kundar fáa alt til heimið, aðrar vørur og tænastur fyri kappingarførar prísir. Høvuðsvørubólkarnir eru máling, innbúgv, hvítvørur, el-tól, búnýti, KT og gólv.